# Assa Johannesen 80 ár



Í dag, hósdagin 21. september, verður Astrid Johannesen í Klaksvík 80 ár. Hon hevur búð í Klaksvík alla sína tíð, og hon hevur altíð verið nevnd Assa.

Assa er ættað av Vágsheygnum. Foreldrini vóru Armgarð og Dávur úr Gerðum. Tey fingu tíggju børn, sum øll búsettust í Klaksvík uttan Emma, sum í nógv ár var lækni í Fuglafirði og nú býr í Havn. Assa var triði yngst í systkinaflokkinum og yngst av teimum fýra systrunum.

Assa giftist í 1949 við Johannes Johannesen, sum var ættaður úr Dali. Í Klaksvík var hann nevndur Jóhannes í Dali ella bara Dalbingurin.

Fryntligi dalbingurin kom til Klaksvíkar at vera neytadrongur hjá Kjølbro, sum undir krígnum hevði fingið sær neyt og fjós. Jóhannes var eisini hjá Kjølbro í Vatnsoyrum, áðrenn hann fór at læra í Klaksvík. Hann lærdi til snikkara hjá Hans Olsen ella Hans á Verkstaðnum, sum hann varð nevndur. Jóhannes búði í Trøllagili hjá lærumeistaranum, inntil hann giftist við gentuni, sum hann hevði funnið sær í grannalagnum.

Seinni arbeiddi snøggi snikkarin úr Dali á verkstaðnum, sum Kjølbro hevði á Varpinum og síðani fyri seg sjálvan og saman við øðrum. Jóhannes var 75 ára gamal, tá ið hann doyði í 1995.

Assa hevur verið eitt konubrot. Hon hjálpti í fleiri ár mammuni við stóra húsarhaldinum á Vágsheygnum. Hetta gjørdi hon eisini eftir, at hon hevði fingið elsta sonin og tvíburðarnar, sum tey mistu beinanvegin.

Tá ið brøður hennara í sekstsi árunum og sjeyti árunum høvdu Dávavirkið, arbeiddi Assa støðugt har. Seinni var hon á flakavirkinum á Kósini, og so fekst hon við so mangt annað. Eitt nú vaskaði hon skip og dugnaði Álvi Klakk, sum keypti fugl og seyð tey mongu árini, hann hevði handilin úti í Klaksvík.

Sálarliga yvirskotið hevur verið stórt hjá Assu, sum hevur verið sannur menniskja kennari og so mongum hevur veitt ráð og leiðbeining, ið hevur verið grundað í klettafastu kristnu trúnni.

Flestu av børnunum hjá Armgarð og Dávuri úr Gerðum búsettust á Vágsheygnum – ikki so langt frá barnaheiminum. Talan er ikki um tann stóra teinin burtur frá barnaheiminum, men tá ið Assa og Jóhannes bygdu á Lítlubrekku, sum tað tá kallaðist, vóru húsini hjá teimum millum tey ovastu á vestursíðuni í Klaksvík.

Assa og Jóhannes eiga sjey børn: Jóannes (1950), Dagny Tróndheim (1953), Súsanna í Stórhúsi (1955), Annika Færø (1957), Finnur (1959), Bogi (1965) og Dávur (1970). Súsanna býr í Havn, og øll hini búgva í Klaksvík.

Føðingardagin heldur Assa heima við hús á Brekku 24, har hon er at hitta frá klokkan 18.

J

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Edvard Høghamar, á Eiði**, vanliga nevndur Hans í Fjósinum, andaðist í heiminum 20. september, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Hans, kunnu lata eina peningagávu til Eiðis kirkju, konta í peningastovnunum.

**Maritt Jensen, Leirvík** andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikumorgunin 20. september, 64 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Rúna Heinesen í Leirvík** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Rúna kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Leirvík. Konto í peningastovnunum

---

# Amariel Norðoy í Glarsmiðjuni

TÍÐINDASKRIV



Fríggjadagin 22. september kl. 15.30 til 17.30 letur ein framsýning við málningum hjá Amariel Norðoy upp í Glarsmiðjuni í Dr. Jacobsensgøtu 7 í Havn. Eisini er opið leygardagin 23. oktober kl. 15.30 til 17.30.

Á framsýningini eru olju og akryl málningar, skravumyndir, akvarellir og litografiir.

Framsýningin verður opin til 6. oktober, mánadag til fríggjadag kl. 10 til 17.30.

---

## Tøkk

Hjartaliga vil eg takka øllum tykkum, sum mintust til mín á mínum 80 ára degi ólavsøkudag.

Takk tit, ið komu inn at vitja, blómur, gávur, heilsanir og uppringingar.

**Kærar heilsanir**
**Marjun Nielsen, Landavegur 5**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Hans Edvard Høghamar**
Eiði

andaðist 20. september, 77 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju leygardagin 23. september kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hildigarð, Heini, Annsy, Nomi og Ólavur**

*Tey, ið ynskja at minnast Hans kunnu lata eina peningagávu til Eiðis kirkju, konta í peningastovnunum.*

---

Landsfelag Pensjónista:

# Taka undir við broytingum í pensjónini



SIGVALD KRISTIANSEN
næstform., vegna Landsfelag Pensjónista

**– Hækkið grundupphæddina til tað sama, sum hon er fyri støk, og takið av skattingina av viðbótum og samhaldsfasta. Hetta vildi verið ein bati fyri tey, sum onga eyka pensjón hava, og so kom eisini at vera javnvágur millum støk og hjún, heldur Sigvald Kristiansen, næstformaður í Landsfelag Pensjónista**

Nú »Uppskot til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum« er komin fyri á tingi, vil Landsfelag Pensjónista gera vart við, at vit sum umboð fyri pensjónistarnar eru sera áhugaðir í, hvat tinglimir fara at gera í hesum máli.

Uppskotið er beint í trivnaðarnevndina, og Landsfelagið hevur sent hesi nevnd bræv, har vit lýsa okkara hugsan, og taka vit sum heild undir við uppskotinum.

Grundgevingin fyri hesum er, at vit ferð aftan á ferð á fundi við pensjónistafeløgum í hinum Norðurlondum, sum vit hava eitt gott samarbeiði við, mugu ásanna, at vit eru munandi aftanfyri, tá talan er um fólkapensjón. Hertil kemur eisini, at fólkapensjónin er ikki hækkað í mun til dýrtíðina, so alt í alt verður minni eftir hjá teimum, sum bara hava sína fólkapensjón at liva av.

Fólkapensjónin og samhaldsfastaeftirlønargjaldið verða ofta blandaði saman, hóast tey eru hvør sítt. Eisini verða ofta grundupphæddin í fólkapensjónini og viðbøturnar nevndar í einum, hóast grundupphæddin er skattafrí, meðan viðbøturnar og samhaldsfasti verða skattaði. Eisini verður munur gjørdur á hjúnum og støkum.

Fyri at gera hetta so einfalt sum møguligt eftir teimum tølum, sum eru til taks, so ein og hvør kann meta um, hvussu nógv ein pensjónistur hevur at liva av, tá privat pensjón ikki er roknað uppí, kunnu hesi tøl setast upp:

Ein *stakur* persónur fær í 2006:
8.121 x 12 = 97.452 kr. um árið, her skal so skattur roknast av viðbót og samhaldsfasta, umleið 25%, eftir verður so áleið 73.089 kr. um árið ella *6.091 kr. um mánaðin.*

*Eini hjún fáa í 2006:*
13.286 x 12 = 159.432 kr. um árið, her skal so eisini roknast skattur av viðbótum og samhaldsfasta umleið 25%, eftir verður so 119.571 kr. um árið, ella *9.965 kr. um mánaðin* til bæði.

Eitt hugskot kundi verið at hækkað grundupphæddina í fyrsta umfari til tað sama, sum hon er fyri støk, og so tikið av skattingina av viðbótum og samhaldsfasta. Hetta vildi verið ein bati fyri tey, sum onga eyka pensjón hava, og so kom eisini at vera javnvágur millum støk og hjún. Tað, sum pensjónistar vinna út yvir hesar veitingar, eigur at skattast eftir vanligum skattareglum.

Við vón um eina jaliga viðgerð frá øllum tingmonnum og flokkum og nevnd.

*Skála 20.09.06*

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**John Danjal Pauli Ludvig**
vanliga nevndur Jobboron

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri kransar, blómur og gávur.

**Inga, Dan, Maria, Karina, Kristian og Oliver**

Sosialurin
www.sosialurin.fo